dag frá degi

dagbókin

Gullbrúdleyp

Í dag kunnu hjúnini Sára og Edvard Jacobsen, Gjógvará í Fuglafirði, halda gullbrúdleyp.

65 ár

Í dag fyllir Alma Matras, Í Búðunum, Klaksvík, 65 ár. Hon er burturstødd føðingardagin.

80 ár

Seinasta sunnudag, 10. desember, fylti Helena Joensen, við Gjógv, 80 ár.

KFUK

Sunnudagin kl. 16.00 verður limafundur við Onnulisu Arge, húsmóðir.

Samkoma teirra eldru

verður við Mørkøre, presti í KFUK týsdagin kl. 16. Evni: Har einglarnir sungu.

Evangeliska Røddin

Evangeliska Røddin frá Monte Carlo hoyrist hvørt mánakvøld kl. 21 á millumbylgju 205 m 1466 khz.

Orð krossins

á íslendskum frá Monte Carlo hoyrist hvørt mánakvøld kl. 23.15 á millumbylgju 205 m 1466 khz.

Frá brúkarafelagnum

Tær mest vanligu klagurnar, ið koma til Brúkarafelagið eftir jól eru um keyptar lutir, ið ikki kunnu berast aftur.

Tíverri er tað ikki enn ein sjálfrylgja, at kunna koma aftur við lutum ein hevur keypt uttan so, at okkurt er galið við teimum. Er hetta tilfellið tá **skulu** teir kunna býtast um.

Tað er tí vert aftur í ár at minna fólk á hetta:

1. Bið um kvittan ella kassabon fyri tað, ið keypt verður.
2. Fá greiði á, um vøran kann býtast um, um peningurin tá verður útgoldin aftur, um ein fær kreditnota ella um annað skal keypast í staðin fyri.

Ein brúkari av bygd greiðir BF. frá, at hon fyri umleið einum ári síðani keypti nøkur krúss. Krússini vóru ensk av merkinum SADLER.

Tað, sum nú hendir er, at glasururin skallar av (blómudekorationin), tá ið hon vaskar upp. Orsøkirnar kunnu vera nógvar. Feilur kann vera í glasurinum, tað kann vera ov illa brent ella okkurt verður gjørt galið, tá ið vaskað verður upp. Brúkarin er bangin fyri blýggi, men har skuldi eingin vandi verið.

Tá ið vit nevna uppvaskið, er tað tí at fleiri og fleiri fáa sær uppvaskimaskinu uttan at hugsa um, um tær køksbúnyttur (servise) tey hava, tola at fara í maskinuna. Dekorationónir og pyntikantar kámast ella detta av og køksbúnytturnar kunnu litfarast. Tað kann hugsast, at tað er hetta, ið hent er við áðurnevnda krússi. Kanska kann eisini vera vert at nevna at uppvaskisápan, bæði tann til maskinuna og eisini tann vanliga, eru sterk evni, ið eiga at verða nýtt við varsemi. Tað er nóg mikið at nýta umleið helvtina av tí, ið stendur á pakkanum, tí vatnið her hjá okkum inniheldur, sum vit øll vita, einki kálk.

Skal Brúkarafelagið geva góð ráð til tey, ið hava uppvaskimaskinu, verða tað hesi:

1. Keyp bert slíkt, ið tolir at fara í uppvaskimaskinu.
2. Tað fína stellið, ið kanska ikki tolir at koma í maskinuna er best at vaska upp við hond.
3. Ver varin við uppvaskisápuni.

Gleðilig jól.

Brúkarafelagið

HB. Tá vit søgdu frá, hvør ið var í nevndini í Brúkarafelaginum, hava vit gloymt eitt navn ímillum. Tað er Lina Arge, J. C. Svabosgøta, Tórshavn.

Ein kvøða til Jóhannes Fr. Joensen á hansara 75 ára føðingardegi

Smáir løkir
at áunum renna.
Air í spælandi kæti
— dráttmikla havið —
at sær tær dregur.

Í atburði og lyndi
— Tú havsins sonur,
— Tú havsins sonur,
eins og fyribrigdi hetta,
fjølbroytt í skapi,
sum spælandi løkir —
kann javnmetast.

títt stavnhald er eyðsæð
— skapandi lyndi,
dragandi máttur —
uttast í havsbrúnni
ættarlið komandi vilju sjá.

Menniskjans samleiki
— dvørgamál í homrum,
livsleikin harða —
neyvt tú væl kennir.
Javnrættarloðan
ei undir skeppuna fjalir.

Stremba vil framá
— á rættvísisleið —
Leið tín,
— eins og túsundtals løkir.
Krýnt verður verkið —
ber hagar
tær grønkandi fløturnar vænta

heilsan *vinur*

Summi av orðunum, sum sett eru í orðatalvuna, eru óføroysk orð, sum fólk brúka á gøtuni sum «føtuføroyskt». Endamálið við hesum er, at eitt »meiri føroyskt« orð skal setast í staðin, til dømis »ymiskt« fyri »forskelligt« o.s.fr.

